
IRF-spælið
MÁL
Bilurin er nú fullur og tískil ógvuliga tungur. Tú trekkir ikki so væl í brekkuni og mást **flyta 4 fet aftur**.
IRF
PAPP
Tú mást stúva pappið betur í hvíta posa. **Flyt 3 fet aftur**.
Ruskið er væl skilt og tískil kanst tú koyra víðari við fullari ferð. **Ringla einaferð afturat.**
BATTARÍ
Battarí eru latin í vanliga ruskið. **Bíða eitt umfar**, meðan battarí verða løgd í eina krukku og so í reyða posa.
Tú hittir eina konu og greiðir henni frá, at allar glas-krukkur kunnu latast inn á bingjuplássið til endurvinning. **Flyt 3 fet fram**.
GLAS
Tú heintar nógvar reyðar posar við m.a. ljósperum og spreydósum í. Tú gleðist um, at fólk eru so røsk at skilja í reyða posa. **Flyt 3 fet fram.**
LJÓSPERUR
Eitt húski hevur gloymt at skilja pappír í hvíta posa. **Bíða eitt umfar**, meðan pappírið verður skilt.
PAPPÍR
IRF-spælið er gjørt í samstarvi við Angelu og Hannibal.
Tú heintar ruskposar og skalt koyra hesar til IRF á Hagaleiti. Tann, ið er fyrstur við ruskinum, vinnur spælið.
BYRJA HER
Tú ert í góðum lag í dag, tí veðrið er gott at heinta ruskposar. **Flyt 2 fet fram.**